

*Uttan mun til, hvussu fínt urið var ella ikki, so hava tey flestu í umleið tey seinastu 50 árini – og summi longur, havt eitt armbandsur, sum segði teimum klokkuna. Tað ber næstan ikki til at liva eitt vanligt lív í dag, uttan at hava skil á tíðini. Tað endar við kaos.*

# Tíðin

Eitt nýtt ár er nú byrjað – tað gamla árið er farið. Vit hava brent bál og skotið rakettir og buldrað nógv um ársskifti. Hetta fyri at rudda burtur tað gamla og rudda slóð fyri tí nýggja. Vit vita, hvat er hent í tí árinum, sum farið er, men hvat tað nýggja árið kemur at bera í sær fyri okkum av góðum og illum, tað vita vit ikki uttan kanska fíggjarlógina og hvussu skattaprosentið verður í teimum einstøku kommununum

JÓAN PAULI JOENSEN
Professari



**Nýggjárshugleiðingar. (Hildnar í Útvarpi Føroya nýggjársdag 2006.)**

Nú eru tað longu farin heili 5 ár av hesi øldini. Fyri flestu av okkum var árskiftið 1999/2000 eitt ógvuliga sermerkt fyribrigdi. Ikki bert var talan um eitt aldarskifti, men eisini um eitt 1000-ársskifti. Ì alt lív okkara høvdu vit skrivað 19, sum tað fyrsta talið í árstalinum. Tað kendist tí merkiligt og ikki sørt óttafult at vita, at vit nú frameftir skuldu skriva 20 sum tað fyrsta. Tað mestsum hekk okkurt álvarsligt og duldarfult í luftini – ein óítøkiligur ótti – av hesum.

Fólk um allan heim livdu eisini í stórum ótta fyri tí, sum møguliga kom at henda við teldum og teldukervum, har tíðin er ein av teimum berandi súlunum. Men fyri tiðarteljingina vísti árstalið 2000 ikki at gera tann stóra mun. Okkurt hendi kanska á onkrum av teldunum, men mær vitandi var tað ongin størri katastrofa.

Óttin fyri ár 2000 er nú farin. Vit hava vant okkum við at skriva 2000, 2001, 2003, 2004 og 2005. Vit koma kanska at mistaka okkum nakrar ferðir í januar og skriva 2005 í staðin fyri 2006, men skjótt hava vit vænt okkum at skriva rætta árstalið.

Hetta er, tá vit skriva við hond, men tað er rættiliga sjáldan, at tað verður gjørt – okkurt so hissini kanska. Tey, sum skriva nakað av týdningi, brúka fyri tað mesta teldu. Kanska onkur serlingur enn er at finna onkrastaðni, sum skrivar uppá skrivimaskinu fyri ikki at siga við fyllipenni. Ikki tí fyllipennur er eitt ediligt skriviamboð.

Er tíðin fyrst sett rætt upp í telduni, so dugir teldan sjálv at meta um klokkutíðina. Árið, dagurin og tímin kemur av sær sjálvum fram á talvuni á teldutólinum og á tí, sum teldan letur frá sær t.d. teldubrøvum og faksum. Teldan fremur skipan og ordan í øllum. Tað sama er við øllum smáteldum.

Frammanfyri mær liggur fartelefonin, og hon sigur mær, at klokkan er 14.53, og at tað er týsdagur 27. desember, hesa løtu eg so smátt eri byrjaður at hugleiða. Hyggi eg eftir einum SMS-boðum eg havi fingið frá dóttir míni, stendur ikki bert dagurin, men bæði tímin og sekundið. Tað ber til at máta og skjalprógva tíðina niður í minstu eind. Einaferð var tað ein studentur, sum hevði sent uppgávu sína sum fax, men tíverri eitt korter ov seint, talið 12.15 stóð so sjónligt á pappírinum – tað stóð tað ikki á tí, sum skrivarin hevði tikið ímóti.

Nú eg eri biðin at gera mær hugleiðingar í sambandi við nýggjárið havi eg valt at tosa um fyribrigdið tíð, sjálvt um eg als ikki havi tíð til tað. Hetta er jú ein tíð, tá ein eigur at hugna sær við familjuni og ikki skriva hugleiðingar.

### Tíðarrokning

Tíðarrokning sum fyribrigdi er ógvuliga gomul, og flestu fólkasløg hava roynt at máta tíðina so ella við at fáa eitt ávíst tíðarskil á døgunum og sjálvum sólarárinum. Hetta er í sær sjálvum ein sera áhugaverdur søguligur spurningur, men tað lata vit fara á hesum sinni.

Okkara tíðarrokning byggir á tann julianska kallendaran, sum kom meðan Julius Cæsar var í velmaktini. Men hesin kallendari var ikki heilt beinur í mun til ta røttu astronomisku tíðina og árið fór so við og við nakrar dagar av leið.

Pávin Gregorius fekk í 1582 køn fólk at rætta kallendaran, so at hann eftir tað kom at verða so rættur, sum hann kundi verða. Vit í Europa og Amerika brúka enn tann gregorianska kallendaran. Tað finnast kortini eisini aðrir kallendarar, men mær vitandi líkjast teir í sínum astronomiska grundstøði tí gregorianska, hóast mentanarsøguliga útgangsstøði er ørðvísi. Muslimar taka støði í føðing Muhamed ístaðin, meðan okkara kallendari hevur Kristi